

# Tjóðveldið fremst í Hoydølum

*Kristina Háfoss fekk stóra undirtøku, tá hon var við á veljarafundi í Hoydølum*

**Studentaskúlanæmingar eru fyri tað mesta tjóðveldisfólk. Hetta kann staðfestast eftir veljarafundin, sum næmingaráðið í studentaskúlanum skipaði fyri**

VELJARAKANNINGAR
*Stefan í Skorini*

Tjóðveldisflokkurin vann stórt, tá næmingarnir í Hoydølum skipaðu fyri valfundi í samkomuhøllini í Hoydølum týsdagin 23. apríl. Næmingarnir skipaðu fyri veljarakanning áðrenn og aftaná fundin. Síðani vórðu úrslitini samanborin.

Heili 42,4 prosent av næmingunum søgdu seg stuðla Tjóðveldisflokkinum eftir veljarafundin. Kristina Háfoss, sum umboðaði Tjóðveldisflokkin, megnaði enntá at økja um sína undirtøku undir fundinum. Áðrenn fundin fekk tjóðveldið 39,5 prosent, og hetta talið øktist við smáum trimum prosentum.

Langt aftanfyri vóru fyrst Javnaðarflokkurin, síðani Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin.

Javnaðarflokkurin fekk eftir fundin 20,5 prosent. Hetta var góð fimm prosent eftir reyv, tí undan fundinum søgdu 25,7 prosent seg stuðla Kristiani Magnussen og hansara flokki.

Fólkaflokkurin, ið var umboðaður av Bjarna Djurholm, fekk undan fundinum 14,8 prosent. Aftaná fundin var stuðulin lopin uppá 17 prosent.

Magni Laksafoss, sum var umboð fyri Sambandsflokkin, fekk bara 11,6 prosent eftir fundin. Áðrenn høvdu 15,7 prosent stuðlað flokkin.

Miðflokkurin við Jónfinni Olsen tvífaldaði sína undirtøku frá 3,3 prosent til 6,7 prosent áðrenn og aftaná.

Úrtøkan hjá Sjálvstýrisflokkinum var heldur soltin. Bara 1,8 prosent søgdu seg stuðla elsta flokkinum í landinum. Áðrenn fundin fekk flokkurin 1 prosent.

Viðmerkjast skal, at ikki allir næmingarnir, ið luttóku í kanningini, hava valrætt. 210 fólk vórðu spurd áðrenn fundin, og 224 vórðu spurd eftir fundin.




## Tøkk

Ein hjartans tøkk verður veitt tykkum øllum, sum á ymsan hátt hjálptu og fjálgaðu um okkum í stóru sorg okkara, tá ið høgt elskaða mamma, omma, systir og vermamma okkara

**Selma Seyer Hansen**

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*

**Anna-Elisabeth, Guðrun, Tina og Lillian**



# Ákæruvaldið savnar prógv

RÚSEVNI
*Stefan í Skorini*

Í hesi vikuni fall enn ein dómur í stóra rúsevnamálinum. Ein 27 ára gamal maður fekk seks mánaða treytaleysa fongsulsrevsing fyri keyp av ymiskum rúsandi evnum. Alt var tó til egið brúk.

Maðurin er dømdur fyri at hava keypt 40 gramm av kokaini, góð 100 gramm av hassji og nøkur heilt fá gramm av amfetamini.

Maðurin játtaði seg sekan í ákærunum, men hann hevur biðið um umhugsunartíð, áðrenn hann ger av, um hann skýtur dómin inn fyri Landsrættin, ella um hann tekur við honum.

Ákæruvaldið er nú farið undir at elta allar kundarnar hjá bakmonnunum í stóra rúsevnismálinum. Undir avhoyringum av løgregluni og í Føroya Rætti er tað komið fram, hvønn hesir ymsu menninir hava selt til. Hesir verða nú eisini drignir í rættin.

Við at avgreiða hesi rættarmálini savnar ákæruvaldið og løgreglan saman prógv ímóti tí einasta manninum, sum enn situr varðhaldsfongslaður í rúsevnismálinum – ein 35 ára gamal dani, ið hevur sitið avbyrgdur síðan 16. januar.

Mánadagin verður aftur rættarfundur í rúsevnismálinum. Tá verður ein 37 ára gamal maður ákærdur fyri keyp av rúsevnum til egið brúk.

## Luttaka í heimsins størstu svimjikapping

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Havnar Svimjifelag hevur júst givið eitt blað út, sum nevnist Svimjiblaðið, og tað er sent í øll húsarhald í Føroyum.

Her stendur m.a. at lesa, at fyrst í mai fara trý lið við svimjarum hjá HS at luttaka í eini stórari altjóða svimjikapping í Danmark. Hetta er fimta árið á rað, at henda kappingin verður hildin, og hon er nú heimsins størsta. Teir tríggjar dagarnar kappingin er, skulu heili 798 heiðursmerki handast.

Svimjarar eru frá 10 árum og uppeftir, og teir kappast í átta aldursbólkum. Umleið 35 svimjarar fara úr Føroyum, og kappingin er frá 10. til 12. mai.

Í blaðnum eru annars fleiri áhugaverdar greinar, sum varpa ljós á virksemi hjá svimjifelagnum í høvuðsstaðnum. Hans Andreas Djurhuus, formaður í svimjifelagnum, sigur í blaðnum, at ungdómsarbeiðið hjá felagnum er av alstórum týdningi fyri ungdómin, ið hevur sína dagligu gongd har.

Tilfarið er fjølbroytt. Eldri svimjarar skriva um svimjing fyrr í tíðini og paraolympiskir vinnarar skriva um at seta sær mál.


## Ert tú bitin av web's :-)



Ert tú internetforritari og leitar eftir avbjóðingum? So leita vit eftir tær.

Sansir eru eitt samskiftisvirki, har marknaðarføring á internetinum fær ein alsamt størri leiklut.

Vit eru í millum annað í ferð við at menna eina CMS-skipan (Content Management System), ið hevur víst seg at vera væl umtókt. Vit arbeiða við dynamiskum loysnum, sum eru skraddaraseymaðar til virki og felagsskapir. Tín uppgáva verður at vera við til at menna skipanina og gera serligar loysnir til einstaka virkið.

Tú hevur viðkomandi útbúgving, ert datamatikari, datanom ella líknandi. Tú hevur kunnleika til ASP og SQL, og tað er ein fyrimunur, um tú kennir til COM-komponentar og dugir at handfara Visual InterDev. Royndir á økinum eru eisini ein fyrimunur, men ongin treyt.

Tú fært góðar møguleikar fyri menning – bæði fakliga og menniskjaliga. Vit kunnu bjóða tær skeiðmøguleikar í tann mun, sum tað hóskar inn í arbeiðsgongdina.

Tú skalt vera ágrýtin, røkin og líka arbeiðssamur sum ein vespa. Vilt tú bjóða tínum kunnleika av, og hevur tú hug at menna teg víðari í einum livandi umhvørvi saman við dugnaligum fólkum, so lat okkum hoyra frá tær.

Send okkum umsókn við prógvum og møguligum viðmælum innan 1. juni. Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum og fáa meira at vita um starvið.

SANSIR

PF. SANSIR • REKLAMUHÚS • POSTBOKS 1099 • TINGHÚSVEGUR 47 • 110 TÓRSHAVN • TEL 355 355 • FAX 355 350 • SANSIR@SANSIR.FO • WWW.SANSIR.FO

Sansir eru eitt virki, ið tekur sær av heildar-samskifti. Hugskotið er berandi styrkin. Vit hjálpa virkjum við samskifti, so tað svarar til samleikan og mentanina hjá einstaka virkinum.

Sansir hava drúgvar royndir í at geva virkjum eina útsjónd. Vit leggja til rættis og greiða lýsingarherferðir. Og vit hjálpa virkjum við kunning, tíðindaskrivum og líknandi.

Sansir brúka eisini internetið sum eitt arbeiðsamboð í samlaðu marknaðarføringini.
Á Sansum arbeiða sjey fólk. Vit eru at hitta á www.sansir.fo